# Fiskimálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 31. juli 2019 |
| Mál nr.: | 19/00073 |
| Málsviðgjørt: | RR/HD/JN |
| Eftirkannað: | 25. juli 2019 |

**Løgtingsmál nr. 3/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Stilling av fiskidagatalinum í bólki 5)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**
(Stilling av fiskidagatalinum í bólki 5)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018, løgtingslóg nr. 162 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 178 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 186 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 66 frá 9. mai 2019, verður § 74, stk. 1, nr. 6 orðað soleiðis:

"6) Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu: 8.879 fiskidagar, umframt 1.127 fiskidagar markaðir til ikki fult riknar útróðrarbátar."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Nú árið 2019 er gott hálvrunnið kann staðfestast, at allir fiskidagar í bólki 5 B eru brúktir. Henda støða hevur ta óhepnu avleiðing, at útróðrarmenn í bólki 5 B, ið hava inntøkuna frá útróðri sum teirra einasta inntøku, mugu leggja niður sítt virksemi. Tí verður við hesum uppskoti lagt upp til at hækka fiskidagatalið hjá bólki 5, har økta dagatali er markað ikki fult riknum útróðrarbátum, bólki 5 B.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi er dagatali í bólki 5 ásett til 8.879 fiskidagar. Fiskidagatalið, ásett fyri bólk 5, verður lutað millum bátar við fiskiloyvi 5 A og fiskiloyvi 5 B, sambært kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons. Ásetingin í kunngerðini um býtið av fiskidøgum í bólki 5 er, at bátar, ið hava avreitt fyri 200-túsund kr. ella meira í 2018 verður flokkaðir í bólk 5 A í 2019. Teir bátar, ið hava avreitt fyri minni enn 200-túsund kr. í 2018, verða flokkaðir í bólk 5 B í 2019. Nú árið 2019 er gott hálvrunnið kann staðfestast, at allir fiskidagarnar í bólki 5 B eru brúktir. Henda støða hevur ta óhepnu avleiðing, at tað eru útróðrarmenn í bólki 5 B, ið hava inntøkuna frá útróðri sum teirra einasta inntøku, sum mugu leggja niður sítt virksemi.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at virksemi í bólki 5 B kann halda fram, undir hesum at tryggja, at útróðrarmenn í bólki 5 B, ið einans hava inntøku frá útróðri, kunna halda fram.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið er gjørt sum eitt heildaruppskot fyri bólk 5, men ætlanin er, at hækkingin í fiskidagatalinum verður tillutað bólki 5 B.

Skotið verður upp, at hækka fiskidagatalið fyri ikki fult riknar útróðrarbátar, bólkur 5 B, restina av 2019 við 1.127 døgum.

Yvirlit yvir avreiðingar frá Fiskamarknaði Føroya fyrra hálvár 2019 vísir, at 1.127 fiskidagar eru brúktir, har avreiðingarnar eru minni enn 300 kilo hvønn fiskidag. Samlaði fiskiskapur fyri hesar 1.127 dagarnar hevur verið 221 tons, t.v.s. 196 kilo í miðal hvønn dag. Yvirlitið umboðar áleið 77 % av samlaðu brúktu døgunum fyrra hálvár 2019.

Samlaða veiðan fyri bólk 5 fyrra hálvár í 2019 er 4.415 tons. Smærru avreiðingarnar á Fiskimarknaði Føroya umboða harvið bert 5 % av samlaðu veiðini. Tískil kann staðfestast, at hesir dagarnir hava lítla ávirkan á samlaða veiðitrýstið fyri allan bólkin fyrra hálvár.

Mett verður tí, at grundarlag er fyri at hækka fiskidagatalið við teimum 1.127 fiskidøgunum, og at hækkingin eigur at markast til bólk 5 B.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er ikki sent til ummælis.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri bólk 5 B, tí fiskidagatalið við uppskotinum verður hækkað. Hetta er somuleiðis galdandi fyri tey virki og øki, ið beinleiðis eru knýtt at hesum partinum av útróðrinum.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið snýr seg um at áseta fiskidagar at verða brúktar av pørtum av fiskiflotanum, sum fiskar botnfisk undir Føroyum. Á tann hátt hevur lógaruppskotið ávirkan á, hvussu botnfiskastovnarnir, sum partur av havumhvørvinum, verða troyttir. Hóast hetta verður ikki mett, at uppskotið hevur stórvegis avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið er ikki tengt at millumtjóðasáttmálum, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar við atliti at millumtjóða samstarvi Føroya.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotinum verður fiskidagatalið fyri bólk 5 restina av 2019 hækkað við 1.127 døgum.

Í galdandi løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi er dagatali í bólki 5 ásett til 8.879 fiskidagar. Fiskidagatalið, ásett fyri bólk 5, verður lutað millum fult riknar og ikki fult riknar útróðarbátar, sambært kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons. Uppskotið broytir ikki við hetta býtið.

Uppskotið hækkar fiskidagatalið samstundis, sum tað verður tilskilað, at økta fiskidagatalið á 1.127 fiskidagar verður markað til ikki fult riknar útróðrarbátar, t.e. bólki 5 B sambært kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons. Sambært kunngerðini eru teir bátar, ið hava avreitt fyri minni enn 200-túsund kr. í 2018, flokkaðir í bólk 5 B í 2019.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, 31. juli 2019

**Høgni Hoydal (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur